fj

 

# SAMSKIPARI TIL UTTANRÍKISTÆNASTUNA

## Vit sóknast eftir einum dugnaligum, ágrýtnum og nærløgdum samskipara

**Starvið**
Talan er um eitt fjølbroytt fulltíðarstarv í einum spennandi arbeiðsumhvørvi. Arbeiðsuppgávurnar eru skiftandi, og fleiri teirra hava altjóða dám. Tú fært sostatt møguleika at menna teg bæði fakliga og persónliga á fleiri mótum.

**Samskiparin fer m.a. at røkja:**

- Bókhald, skjalagoymslu, KT, hølisumsiting og fundarfyrireiking
- Praktiska fyrireiking og samskipan av útlendskum vitjanum
- Lættari málsviðgerð
- Skrivarauppgávur og rættlestur
- Aðrar umsitingarligar uppgávur

**Førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarin hevur hollar royndir í skrivstovuyrkinum og innlit í almenna fyrisiting. Harumframt ynskja vit ein persón, sum:

- Arbeiðir sjálvstøðugt
- Er røkin og fyrikomandi
- Hevur eitt jaligt, ágrýtið arbeiðslyndi
- Megnar at arbeiða undir tíðartrýsti og ofta við fleiri uppgávum í senn
- Kann rættlesa føroyskt, og annars dugir væl danskt og enskt
- Hevur góð samstarvsevni og fegin tekur eyka tøk, tá ið tørvur er á tí

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður flokkað eftir førleikum sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Setanarøkið fevnir um Uttanríkis- og mentamálaráðið og stovnar undir tí. Bygnaðarliga er starvið partur av Aðalskrivstovuni við starvsstaði í Uttanríkistænastuni.

**Nærri kunning um starvið**
Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Gunnar Holm-Jacobsen, deildarstjóra fyri Uttanríkistænastuna, á tel. 556106 at fáa nærri upplýsingar.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum, lívsrensli (c.v.) o.ø. skal sendast við telduposti til **ummr@ummr.fo**

Umsóknir skulu vera Uttanríkis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. januar 2020. Starvið verður sett skjótast til ber. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

---

**Uttanríkistænastan,** ið bygnaðarliga er partur av **Uttanríkis- og mentamálaráðnum,** røkir og samskipar uttanríkispolitiska arbeiði landsstýrisins. Arbeiðsøkið fevnir um millumlandasamstarv, heruppií handilsviðurskifti, trygdarmál, havtilfeingi, økisbundið samstarv, heruppií norðurlendska og arktiska samstarvið, altjóðarætt, tjóðar-branding, menningarsamstarv, neyðhjálp, útflutningsframa, protokoll,og konsularviðurskifti.
Sendistovurnar í Brússel, London, Reykjavík, Keypmannahavn, Moskva og Beijing eru partur av uttanríkistænastuni. www.ummr.fo